# Ráðstevna um dálking í Hetlandi

*Fremsta vitanin hjá vísundamonnum um dálking í havinum verður viðgjørd á ráðstevnu í Lerwick um vikuskiftið*

I dag fer eitt leiguflogfar úr Føroyum til Lerwick, har felagsskapurin NAMCO skipar fyri eini ráðstevnu um tað seinasta nýggja innan dálking av havinum og hvørji árin hetta hevur á djóralívið í havinum. Eisini hvørji árin dálkingin hevur á fólk sum eta uppúr sjónum.

Opna ráðstevnan er lutað sundur í fleiri partar og hesar báðar dagarnar verða ikki færri enn 25 fyrilestrar hildnir. Fyrilestararhaldararnir eru m.a. millum fremstu vísundamenn á økinum og teir fara at borðreiða við tí seinasta sum er komið fram um dálking og árin.

Ein føroyskur fyrilestrarhaldari verður. Tað er Pál Weihe, yvirlækni. Har fer at greiða frá heilsustøðuni hjá føroyingum. Føroyingar eta nógva grind og grindahvalurin er dálkaður av tungmetallum og PCB.

Umboð fyri landsstýrið vera við á stevnuni og løgið skuldi verið um ikki onkur umhvørvisfelagsskapur ikki eisini verður at siggja.

Hetland gjørdist heimskent innan dálking, tá eitt oljutangaskip fór á land beint vestanfyri Sumbiarendan, syðsti landoddi í Hetlandi, herfyri. Ein rættuliga umfatandi dálking stóðst av hesi hending, bæði á sjónum og eisini á landi. Hendan vanlukkan verður eisini viðgjørd á ráðstevnuni.

**jústinus**



*»Transocean 8« fór undir at bora í gjár:*

# 12 pallar bora eftir olju við føroyska markið

*Total Oil Marine fór í gjár undir at bora eftir olju vestan fyri Hetland við flótandi boripallinum »Transocean 8«*

**Aberdeen 12. apríl**



Birgir Christiansen

**ABERDEEN**

Sett var á at bora á 500 metra dýpi í ein landnyrðing frá har, sum BP Exploration og Amerada Hess hava funnið olju í ávíkavist Foinaven og Schiehallion økjunum.

Tað eru bert fáir dagar síðani at Total als ikki vildu gera nakra viðmerking til, hvørt »Transocean 8« skuldi bora brunn 205/12, men í hesari vikuni kom vend í, tá Total hálsaði um og almannakunngjørdi at arbeiðið skuldi byrja í gjár.

Oljufeløgini Total, Statoil, Rangar og Agip, ið hava rættindi til Tranche 8, hava bert tveydimensionellar seismiskar upplýsingar at ganga eftir, men bretski kanningarstjórin hjá Statoil, Henk Duyvermann, sigur, at hesar upplýsingar eru nóg greiðar til at gera av, hvar borast skal. Samstarvið, sum hesi fýra oljufeløgini eru í, skal bora tríggjar kanningarbrunnar í Tranche 8 fyri aldarskiftið.

Tá kanningararbeiðið fyri Total er liðugt seinni í ár, skal »Transocean 8« seta á at bora sokallaða »Newton« brunnin í blokki 208/15 fyri Amoco. Amoco væntar, at skjótt verður settur á hetta arbeiðið í juni.

Amoco hevur eisini ætlanir um at bora ein brunn afturat vestan fyri Hetland, men her verður samstarvið eitt annað enn tað, sum Amoco í løtuni er í. Ein talsmaður fyri Amoco segði, at úrslitið av 16 útbjóðingarumfarinum fór at hava sera stóra ávirkan á ætlaða brunnin.

Eitt annað oljufelag, Elf Enterprise Caledonian, leggur nú eisini til brotst vestan fyri Hetland. Elf Enterprise Caledonian fer at nýta boripallin »West Vanguard« at bora sín brunn í blokki 205/17 eystan vert Schiehallion økið, og harvið verða umleið 12 boripallar at siggja vestan fyri Hetland í ár.

**Birgir Christiansen**

**UMBERING!**

Lesarar og lýsarar biðjast halda okkum til góða, at kunningar- og lýsingarblað okkara vegna postverkfallið og harvið eisini halguna, ikki kom út fyri páskir sum ætlað.

Blaðið er tó komið so langt, at tað verður borið í hvørt hús í Vágum um fáar dagar.

FS

**KALT BORÐ**
**HVØRT KVØLD**
uttan sunnukvøld
Borð kann bíleggjast
HOTEL HAFNIA
Tlf. 11270
Hotellið í Miðbýnum

**SJÓNVARPIÐ Í ÓLAGI????**
- Vit heinta og koyra út
- Leiga eitt meðan tú bíðar
- Fastir prísir
- Umvæla ØLL MERKI

TELEFUNKEN - PHILIPS
**RING 19544**
SALORA - LUXOR o.o.
**RADIO VERKSTAÐIÐ** v/Guttorm Mortensen
Lýðarsvegur 15 - Havn

**CUBASE MUSIK WORKSHOP**
WEEKENDKURSUS D. 5.-7. MAJ 1995
TRE DAGES INTENSIVT MUSIKKURSUS MED KEYBOARD, COMPUTER OG CUBASE
MED
**NILS HARBO**
MUSIC MIND

Vel mødt til en spændende midi-workshop med Steinberg Cubase, et af markedets bedste og mest benyttede sequencerprogrammer til musik.

For alle interesserede uanset niveau. Tips og tricks til mere kreativ udnyttelse af programmet, med grundig indføring i Cubase's mange muligheder.

Gennemgang af alle programmets grundlæggende principper Edit-Windows, Arrange Page, effektive kopieringsrutiner, hurtige tastaturkommandoer, nodeudskrift m.v.. Spar tid og undgå kedelig læsning af en lang manual.

Der bliver rig lejlighed til selv at prøve kræfter med praktiske eksempler i Cubase. Medbring din egen computer, keyboard og musikeksempler og få det hele til at swinge sammen.

*Workshoppen ledes af Nils Harbo, der er musiker, komponist, studieejer og Cubase-specialist fra Music Mind, København. Han er desuden redaktør på grejbladet MidiMag og har mange års erfaringer fra både undervisning, livejobs og pladeindspilninger.*

**NÆRMERE OPLYSNINGER:**
MUSIC MIND, TLF. +45 32 96 06 50 eller
PETUR JACOBSEN, TLF. 298 41149